Eysturkommuna

# Kunngerð

## Broyting í býarskipanini og byggisamtyktini fyri Eysturkommunu.

Við heimild í Løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipan og byggisamtykt, seinast broytt við Løgtingslóg nr. 19 frá 18. mars 2013, verður við hesum uppskot til broyting í almennu byggisamtykini fyri Eysturkommunu framlagt til alment eftirlit.

Broytingin er løgd fram til almenna eftirskoðan í vanligu upplatingartíðum frá 23. apríl 2019 til og við 16. mai 2019 á kommunuskrivstovuni.

**Broyting í byggisamtyktini fyri Norðragøtu fyri matrikul:**
Partur av matr. 187a

**Lýsing, verandi støða:**
Nevndi matrikul liggur sum: ***Havnaøki D***.

**Lýsing um broytingina:**
Partur av nevnda matrikul verður broyttur til:
**Neysta og vinnubygging við serstakari byggisamtykt G2**

**Broyting í tekstinum í byggisamtyktini fyri:**
**Áseting fyri økið G2: Neysta- og vinnuøki við serstakari byggisamtykt.**

**Broyting í byggisamtyktini undir Gøtueiði fyri matriklarnar:**
Partur av matr. 332, 333, 334, 279a, 277a, 287a, 286a, 290a og 327.

**Lýsing, verandi støða:**
Nevndu matriklar liggja sum: ***Landbúnarøki J og Frílendi H***

**Lýsing um broytingina:**
Partur av nevndu matriklum verða broyttir til:
**Havnaøki D**

Møgulig mótmæli og/ella broytingaruppskot skulu skrivliga verða kommunuskrivstovuni í hendi í seinasta lagi mánadagin 11. juni 2019.

Eysturkommuna
12. apríl 2019